## Mouritsen er ivasamur

Christian Mouritsen er ivasamur til landsdystin í annað kvøld. Tað er niðurstøðan hjá Dimmalætting og Kringvarpi Føroya, sum vóru til venjing í Firenze í gjármorgunin. Miðvallarin úr B36 meiddi sær fótin undir venjingini. Hann traðkaði onkurvegna skeivt og legði seg á vøllin og venaði seg. Dimmalætting skrivar, at tað er hjálparfólkini vóru skjót hjá honum, men tað var greitt, at hann kundi ikki halda fram í venjingini. Tað er ikki til at siga, hvussu álvarsamur skaðin er, men Mouritsen er í øllum førum ivasamur.



## Kerr harmast um avboðini

Brian Kerr, landsliðsvenjari, er harmur um, at hann hevur ikki allar leikararnar tøkar til landsliðið. Christian Høgni Jacobsen hevur givið avboð hesaferð vegna skaða. Jákup á Borg og Atli Danielsen hava boðað frá, at teir verða ikki tøkir á landsliðnum komandi tíðina.
– Tað eru leikarar, sum hava drúgvar royndir sum landsliðsleikarar. Tað merkist væl, at teir eru burtur, og tað er sjálvsagt einki at frøast um, sigur Brian Kerr, landsliðsvenjari.

## Gianfranco Zola:

# Prandelli fær landsliðið aftur á beint

**FÓTBÓLTUR** Gianfranco Zola, fyrrverandi italskur stórspælari, væntar, at Cesare Prandelli er rætta venjaraloysnin fyri italska fótbóltslandsliðið



Uni Holm Johannesen

Cesare Prandelli.

Tað er ikki ein stjørna á italska venjarahválvinum.

Hann stóð á odda fyri liðnum hjá Verona, sum flutti upp í bestu italsku deildina í 99.

Hann stjórnaði somuleiðis Venezia, sum vann uppflyting í bestu deildina í 2001.

Annars einki.

Prandelli hevur fingið seg royndan í venjarastarvinum í Parma, Roma og Fiorentina, men hann hevur ongantíð vunnið staðið ovast, tá gullheiðursmerkini eru handaði.

Í morgin stendur Cesare Prandelli á odda fyri italska fótbóltslandsliðnum, sum fær vitjan av Brian Kerr og hansara føroyingum.

Og tað hevur fyrrverandi stórspælarin, Gianfranco Zola, ongar trupulleikar við.

### Fer at roynast væl

Prandelli fekk sín elddóp fríggjadagin, tá Italia vann við bit og slit á útivølli móti Estlandi. Úrslitið var 2-1. Avrikið var lítið sannførandi.

Gianfranco Zola sigur við heimasíðuna hjá UEFA, at italska fótbóltssambandið valdi røttu loysnina, tá Prandelli fekk boðið venjarastarvið.

– Eg havi álit á honum. Hann hevur roynst væl sum venjari higartil, hóast hann ongantíð hevur vunnið nakað stórvegis. Prandelli dugir væl við ungum spælarum, og tað gevur okkum møguleikan at arbeiða við einum øðrvísi og ágrýtnum hugburði á liðnum, metir Zola.



*Italski landsliðsvenjarin fær stuðul frá fyrrverandi stórspælaranum, Gianfranco Zola*

Prandelli var settur í starv undan HM-endaspælinum í summar. Tað var greitt, at Marcello Lippi helt ikki fram aftaná HM.

Prandelli fær hjálp frá Gianni Rivera og Roberto Baggio, sum hava átikið sær leiklutin sum hjálparvenjarar.

### Trýstur

Aftaná eitt sera vónbrotið HM-endaspæl hevur italska landsliðið av álvara nakað at prógva.

Tí er Cesare Prandelli undir trýsti sum venjari.

Fjølmiðlarnir ræðast ikki at leggja eftir landsliðnum, sum hevur verið lítið sannførandi seinasta ári.

Italia tapti fyrsta skrásetta landsdystin undir leiðslu av Prandelli. Filabeinsstrondin vann 1-0 á Italia í venjingardysti í august.

Fríggjakvøldið vann Italia á útivølli móti Estlandi, men italsku fjølmiðlarnir eru ikki bergtiknir higartil.

Ein sannførandi stórsigur er kravið, um Prandelli skal draga andan lættliga aftaná landsdystin móti Føroyum.

Zola er bjartskygdur.

– Tað er ein torførur bólkur, tá tú hugsar um støðuna, sum italska landsliðið stríðist við í løtuni. Men Prandelli fær landsliðið aftur á beint. Tað vendir ikki eftir einum degi, men við tíðini fer liðið at menna seg støðugt undir hansara leiðslu, sigur Gianfranco Zola.

Gianfranco Zola var uppsagdur sum venjari hjá West Ham í summar. Hann hevur áður verið hjálparvenjari á italska U21-landsliðnum.

### FAKTA UM PRANDELLI

Navn: Cesare Claudio Prandelli
Føðingardagur: 19. august, 1957
Aldur: 53
Føðistaður: Orzinuovi, Italia
Yrkisleið sum fótbóltsspælari:
1974-1978: Cremones, 88 dystir og 7 mál
1978-1979: Atalanta, 27 dystir og 3 mál
1979-1985: Juventus, 129 dystir og 8 mál
1985-1990: Atalanta, 119 dystir og 7 mál
Yrkisleið sum venjari:
1990-1993: Atalanta (ungdómsvenjari)
1993-1994: Atalanta
1994-1997: Atalanta (ungdómsvenjari)
1997-1998: Lecce
1998-2000: Verona
2000-2001: Venezia
2002-2004: Parma
2004: Roma
2005-2010: Fiorentina
2010: Italia

### Italski hópurin

**Málverjar:**
Antonio Mirante, Parma
Salvatore Sirigu, Palermo
Emiliano Viviano, Bologna

**Verjuleikarar:**
Luca Antonelli, Parma
Leonardo Bonucci, Juventus
Cesare Bovo, Palermo
Mattia Cassani, Palermo
Giorgio Chiellini, Juventus
Lorenzo De Silvestri, Fiorentina
Daniele Gastaldello, Sampdoria
Cristian Molinari, Stuttgart

**Miðvallarar:**
Daniele De Rossi, Roma
Andrea Lazzari, Cagliari
Claudio Marchisio, Juventus
Riccardo Montolivo, Fiorentina
Angelo Palombo, Sampdoria
Andrea Pirlo, AC Milan

**Framherjar:**
Antonio Cassano, Sampdoria
Alberto Gilardino, Fiorentina
Giampaolo Pazzini, Sampdoria
Simone Pepe, Juventus
Fabio Quagliarella, Juventus
Giuseppe Rossi, Villarreal

### Føroyski hópurin

**Málverjar:**
Gunnar Nielsen, Tranmere
Tórður Thomsen, HB

**Verjuleikarar:**
Jónas Tór Næs, B36
Bartal Eliasen, ÍF
Atli Gregersen, Ross County
Egil á Bø, EB/Streymur
Johan Troest Davidsen, NSÍ
Einar T. Hansen, NSÍ
Hendrik Rubeksen, HB
Pól Jóhannus Justinussen, B68

**Miðvallarar:**
Bogi Løkin, NSÍ
Christian Lamhauge Holst, Silkeborg
Jann Ingi Petersen, NSÍ
Jústinus R. Hansen, NSÍ
Fróði Benjaminsen, HB
Daniel Udsen, EB/Streymur
Christian R. Mouritsen, B36
Símun Samuelsen, HB

**Framherjar:**
Jóan Símun Edmundsson, Newcastle
Arnbjørn T. Hansen, EB/Streymur